## VIÐMERKINGAR

# Umrøða á síðuspori

**Seinnu árini hava kor teirra samkyntu í Føroyum fingið stóra umrøðu. Kanska ongantíð sum júst nú. Sjálvur haldi eg at henda umrøða er komin á eitt ella fleiri síðuspor. Og fari tí at kasta nakrar tankar og meiningar inn í umrøðuna, sigur Sámal Petur í Grund**

Sámal Petur í Grund
Søldarfjørður



Tað fyrsta sum undrar meg er, at nakar samfelagsborgari brýggjar seg um at vera bólkaður eftir sexuellari orientering. Vit hava fleiri bólkingar í einumhvørjum samfelagi. Tær eru sum oftast relateraðar til starv, útbúgving, samfelagsstøðu ella knýttar at eini ella aðrari sjúku. Tað tykir mær løgið at bólka fólk eftir sexuellari orientering. Sjálvur haldi eg, at tað mátti verið eitt aðalmál at verið integreraður við allar aðrar borgarar, heldur enn at bróta út (spretta – koma úr skápinum) úr fjøldini og gera tað til nakað serstakt at sexuella orienteringin er øðrvísi enn hjá grannanum t. d.

### Happing

Tað sum um dagarnar hevur fingið umrøðuna aftur á fyrstu parket er eitt uppskot frá Annitu á Fríðriksmørk og Finni Helmsdal, um at seta í straffilógina, at tað ikki skal vera loyvt at happa nakran grundað á sexuella orientering.

Tað tykist mongum løgið at tað skal vera neyðugt, at løggeva at tað ikki skal vera loyvt at happa nakran, vegna hansara/hennara sexuellu orientering.

Happing hevur altíð verið og kemur altíð at vera. Happingin hongur ikki saman við tí sexuellu orienteringini, men er nakað sum menniskjan er tyngd av í øllum londum og samfelagsbólkum.

Skúlarnir hava trupulleikar av happing, og taka tað upp sum eitt mál við millumbilum, helst tí at trupulleikin tá er vorðin so stórur at okkurt má gerast.

Hetta fyribrigdi er eisini kent frá arbeiðsplássum og umborð á skipi.

Tað er nokk einki at ivast í, at happing í flestu førum verður framd av borgarum sum ikki á annan hátt klára at halda seg á hædd við flest onnur.

Hetta er ein máti at halda sær sjálvum frá niðastu rekkju, ella at syrgja fyri at ein ikki verður tann sum verður happaður, ella verður rukka.

Heldur enn at løggeva nakrar bólkar fríar fyri happing, eiga vit at hava sum mál,at syrgja fyri at upplýsa fólk okkara í ein sovornan mun, at trupulleikarnir av happing vera minimalir.

Upplýsingin hevur nógv betri fortreytir at eydnast enn ein lóggáva hevur tað.

### Happing av samkyntum.

Í eini grein í bløðunum bleiv ført fram, at tað í mestan mun vóru politikarar úr høvuðsstaðarøkinum, sum tóku undir við løgtingsuppskotinum, meðan politikarar av bygd atkvøddu ímóti.

Hetta er rættuliga áhugavert og hevur helst sína grund. Spurningurin er bara hvør grundin er.

Ein av grundunum kann vera, at happing av samkyntum ikki er ein trupulleika úti á bygd.

Tað er ikki óhugsandi at so er, tí vit eru mong sum búgva úti um landið, sum ikki kenna til nakra happing av slíkum slagi.

Í so føri, so hoyrir spurningurin kanska meira heima í politiviðtøkunum fyri Tórshavn, enn í eini løgtingslóg.

### Umrøðan

Sum omanfyrinevnt, so tykir mær at umrøðan, debattin um ein vil, er farin av sporinum. Hetta ivast væl eingin í, aftaná at tónleikabólkurin 200, helst sum eina happening, men lat tað fara, hevur meldað hvalvíksprest Mogens T Christensen til løgregluna. Og ikki minst eftir grein í Dimmalætting 4. januar í ár, skriva av einum sum nevnir seg Ole Wich.

Hvalvíksprestur hevur væl sum øll onnur, loyvi til at hava sína meining og at lata hana koma til kennar í fjølmiðlunum. Harafturat skrivar hann helst bara tað, sum ein stór fjøld av føroya fólki hugsar.

Ole Wich hevur sjálvandi eisini henda rætt, hóast hann niðurger okkum sum fólk og mentan okkara, á ein ógvuliga ódámligan og ósømiligan hátt.

### Herferð

Umrøðan í fjølmiðlunum sýnist annars sum ein herferð, fyri rættindum til tey sum hava bólkað seg sum samkynt.

Henda herferð sær út til at vera stýrd av kreftum uttanfyri landoddar okkara.

Serfrøðingar uttanlands verða eftirspurdir og endurgivnir í loftmiðlunum.

Hótt verður við átalu frá Amnesti og enntá verður Straussburg nevnt, sum ein staður vit kunnu vera drigin til, um vit sum fólk ikki makka rætt.

Hugsi ikki at føroyingar ræðast so illa útlandið sum tilfeldið kanska var fyrr. Vit eru við at berja okkum uppum tað støði, hvar vit altíð føldu okkum við undirlutan yvirfyri tí sum var fremmant.

### Trupulleikar við útlandið

Ført hevur verið fram, at støða løgtingsins í hesum máli, kann skaða okkara umdømi yvirfyri útlandinum. Hugsi enntá at onkur hevur róð frammundir at tað kann fáa avleiðingar, enntá vinnuliga.

At henda støða løgtingsins, vegna føroyska fólkið, skal hava skaðiligt árin á inn- og útflutning okkara er helst at yvirvurdera málið.

Sexuel orientering er hvørki út- ella innflutningsvøra og eigur tí ikki at hava minstu ávirkan á handilsligu viðurskifti okkara við útlandið.

Um so skuldi verið, so eiga vit í minsta lagi ikki at góðtaka tað.

### Áhugaverdir upplýsingar

Í sambandi við greinina hjá Ole Wich, er ein stubbi við faktuellum upplýsningum, sum er rættuliga áhugaverdur og viðkomandi, ikki minst fyri løggevandi valdið í landinum.

Fyrst av øllum, so er ein afturvísing av tí rangsøgn, at talan skal vera um at 10% av fólkinum er samkynt.

Ikki tí, hetta hevur hvørt mansbarn sum kann eitt sindur í rokning, fyri langari tíð síðani funnið út av.

Tað eru ikki 1600 samkynt í høvuðsstaðnum, heldur ikki 40 í nakrari bygd í Føroyum, sum telur 400 fólk.

Men tað mest áhugaverda í hesum faktuella stubba eru orðini: "Yderligere skal man tænke på, at tallet ændrer sig efter det omgivende miljø. I fængsler er det meget højt, i strengt restriktive samfund er det lavt, og i liberale miljøer er det sådan midt imellem, tæt på det naturgivne niveau".

### Miljø og naturgivet niveau

Hetta eru rættuliga tankavekjandi faktuellir upplýsningar. Ikki tí, hetta hevur eisini verið kent, serstakliga við atliti til fongsulsumhvørvið.

Eg haldi at løggevandi valdið í landinum eigur at notera sær hetta, at tað ikki er líkamikið hvat umhvørvið vit velja at liva í.

Tað er væl eingin okkara sum ynskir, at fólk okkara skal tyngjast av árinið, sum serstakliga hevur gróðrarbotn í fongsulsumhvørvinum.

### Skapt í Guds mynd

Menniskjan hevur tikið sær so ymiskar dagar fyri, men vit hava øll tað til felags, at vit eru skapt í Guds mynd.

Tí eiga vit at standa saman og liva saman sum hansara skapningar, í øllum tí margfaldi og fjøltátni hann hevur skapt okkum í.

Eingin grund er til at vit skilja okkum í fleiri bólkar enn neyðugt. Tað kann bara føra til mismun og kanska eisini enntá happing.

Gott nýttár og Guðs vælsignilsi.

# Jesus og frásøgnin um Lot

Jenis av Rana



Fyrr í vikuni endurgav eg part av frásøgnini um Lot, sum vit lesa hana í kap 13 í Bíbliuni. Nøkur túsund ár seinni lesa vit aftur um Lot, tað er Jesus, sum í røðu til fólkið endurgevur frá tí, ið hendi Lot og samtíð hansara.

Hendan ávísa dagin tosaði Jesus við fólkið um dagin, tá Hann fer at koma aftur at taka tey, ið hava givið seg yvir til Hansara, heim í sítt ríki. Álvarsliga minnir hann á týdningin av at vera tilreiðar, nemur við støðuna, tá flóðin mikla herjaði og bert Nóa og tey, ið við honum vóru í ørkini, komust undan. Og so sigur Hann hesi orð um Lot:

...sum tað gekk á døgum Lots: Tey ótu og drukku, tey keyptu og seldu, tey plantaðu og bygdu; men tann dag Lot fór úr Sodoma, regnaði eldur og svávul niður av himli og gjørdi enda á teimum øllum - so skal eisini vera, tann dag Menniskjasonurin opinberast...

Síðani heldur Jesus á við áminningini um at vera til reiðar, tann dag menniskjasonurin opinberast:

....ta nátt skulu tvey vera í eini song; annað skal verða tikið við, og annað skal verða latið eftir. Tvær kvinnur skulu mala á somu kvørn; onnur skal verða tikin við, og onnur skal verða latin eftir. Tveir menn skulu vera úti á markini; annar skal verða tikin við, og annar skal verða latin eftir.

Dagurin Jesus her tosar um hevur enn ikki verið, men liggur fyri framman. Tí er ávaring Hansara altíð tíðarhóskandi, Hann kann jú koma hvørja løtu. Men eins trygt er lyftið Hansara, at seta vit álit okra á Hann, gevur okkum í hendur hansara, so hava vit einki at óttast - eru tryggari enn barnið við bróst móðurinnar.

### Eisini Pætur vísti á Lot

Í einum av seinastu kapitlum Bíbliunar lesa vit aftur um Lot, so týdningarmikil tykist frásøgnin um hendan megnar Gudsmannin at vera. Nú er tað Pætur, sum sera álvarsliga minnir á støðuna, ið fer at taka seg upp á síðstu døgum og vísir á ræðuligu fylgurnar, syndin ber við sær. Beinleiðis endurgevur hann soleiðis úr lívi Lots:

...Býirnar Sodoma og Gomorra legði Hann (Gud) í øsku og dømdi teir til undirgang; Hann setti teir soleiðis teimum til fyridømi, sum á komandi tíðum vildu liva í gudloysi.

Men Hann bjargaði hinum rættvísa Lot, sum píndist av skammleysa atburði hinna gudleysu.

Hesin rættvísi, sum millum teirra búði, píndist jú dag eftir dag í rættvísu sál síni av hinum lógleysu verkum, hann sá og hoyrdi.

Ein vøkur mynd av Lot, sum hóast skeivar avgerðir, sum fingu katastrofalar fylgir, var tryggur, tí hann hevði valt at seta álit sítt á tað, ið heldur. Og tað lønti seg, tann dagin rópið um Sodoma og Gomorra og syndir tess var vorðið ov hart í Himli. Tá mintist Harri Himmalsins hendan rættvísa og bjargaði Honum.

Fantastiskt!

Har sum syndin var stór, var náðin uppaftur størri

Hendan yvirskriftin er tikin úr brævinum til rómverjar og minnir okkum m. a. á, at tað er náðin- óuppiborna gáva Guds, sum ger at vit kunnu koma til Hansara. Hvussu djúpt vit enn falla, kunu vit koma til Faðirin, og Hann reisir okkum upp og veitir okkum tann tryggleika, sum bert Hann kann veita. Ongin synd er til, ið kann forða okkum at koma til hansara og fáa fyrigeving og barnakor hjá Honum. Men vit mugu, sum kenda frásøgnin um burturvilsta sonin eisini minnir okkum á, reisast úr synda- og trælahaldinum og leita til Hann. Avgerðina má hvør einstakur taka - men tá hon er tikin, er alt vunnið, og ætlan Faðirsins við lívi tínum og mínum gerst veruleiki.

Tí lívið er ikki tilvildarligt ella meiningsleyst - tvørturímóti. Tað er ríkt, trygt og spennandi - saman við Jesusi.

**p.s.** Longu dagin eftir fyrstu grein mína skrivaðu tveir lesarar um kunnleika teirra til Lot. Áheitan mín til tykkum báðar er: haldið á at lesa Bíbliuna, havið eitt opið sinni og biðið Heilaga Andan hjálpa tykkum at skilja tað, tit lesa. Tá hava tit eitt spennandi og ríkt lív at síggja fram til.